# Nær eg eri føddur ... á ólavsøku, sjálvandi!

**KLUMMA**

*Kári Mikkelsen*



*Mynd: Sunva Ey. Lassen*

Nú er tað soleiðis, at tað bert eru 365 dagar í árinum, burtursæð frá skotári, tá ein dagur legst afturat. Tí eru føðingardagarnir hjá okkum 48.000 sálum í Føroyum, eins og hjá øllum øðrum heimsins búgvum, sjálvandi býttir út á hesar dagarnar. Runt roknað merkir hetta, at 130 føroyingar í meðal hava føðingardag hvønn einasta dag í árinum. Soleiðis eru nógvir føðingardagar heilt natúrligt eisini um ólavsøkuna.

Ein teirra, ið fallið er í lut at fylla sjálvan tjóðarhátíðardagin, er undirritaði. Sum smádrongur kendi eg dagin als ikki sum nakran hátíðardag, men púra mótsatt. Helt meg vera óhepnan at vera føddan ein slíkan dag, men so hvørt árini løgdust til, tók eg hetta sum ein fyrimun. Hví soleiðis var, skal eg sjálvandi koma inn á.

Tá eg gekk í barnaskúla í heimbygdini, upplivdi eg tað at vera komin til verðina sjálvan ólavsøkudag sum tvífalt keðiligt. Fyri tað fyrsta tí føðingardagurin liggur í summarfrítíðini, og fyri tað næsta, tí so nógv stungu av til Havnar á ólavsøku, og tí ikki kundu koma í føðingardag. Sostatt var dagurin ikki einans skerdur á heimafrontinum, men kundi heldur ikki feirast í skúlanum, tí bæði floksfelagar og eg høvdu frí. Tað var ikki sørt, at eg øvundaði teimum, sum fingu fyrimunir av at fylla í skúlanum. Hetta merkti millum annað, at flokslærarin las søgu og gjørdi dagin hugnaligan fyri føðingardagsbarninum. Men har varð onki til mín og hinar av floksfeløgunum, ið vóru líka »óhepnir« sum eg at fylla í summarferiuni. Ein av teimum var landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, ið er ein dag yngri enn undirritaði.

At eg helt tað vera tvífalt óheppið at vera føddur sjálvan ólavsøkudag, komst av, at so nógv tóku tjóðarhátíðina fram um føðingardagin hjá mær. Hetta var torført at skilja tá, men sum hálvvaksin byrjaði at ganga upp fyri mær, at nokk vóru køkurnar hjá mammu góðar, men kappast við alt tað spennandi, sum ólavsøkan hevði at bjóða uppá, kundu tær altso ikki.

Tó, rætt skal vera rætt. Onkur omma, mostir, systkinabarn ella vinmaður plagdu at koma, áðrenn teir vóru gamlir nokk til eisini at sleppa til Havnar. Og tá var eg sjálvur tað eisini.

Komin í tannárini var frestingin og gleðin við sjálvur at sleppa á ólavsøku størri enn missurin við einum ófeiraðum føðingardegi.

Uppvaksin beint omanfyri Toftagjógv, har ferjulega er ella var, og har Tróndur legði at, var bæði skjótt og lætt at koma til Havnar. Ikki tí, mamma gjørdi ein stóran innsats fyri at gera føðingardagin so góðan og hugnaligan, og tað eydnaðist eisini væl í barnaárunum. Sum fráleið vandi eg meg eisini við, at 29. juli júst var spennandi, tí tað var ólavsøka. Kom tí sjálvur at seta stóran prís upp á ólavsøkuna, sum síðani eg fylti 14 ár og fram til dagin í dag, næstan ongantíð er farin framvið uttan mína luttøku. Tá alt kemur til alt, havi eg helst tikið tjóðarhátíðina uppaftur sterkari til mín, júst tí hon fall á føðingardegnum.

Soleiðis lærdi eg altso at halda nógv av ólavsøkuni og geri tað framvegis. Havi oftani tikið til, tá fólk ynskja mær tillukku og spyrja, um eg haldi nakra føðingardag. »Ja, hann verður sum vanligt hildin á Vaglinum. Har vera nógv onnur, so komið endiliga!«.
Skemt til síðis, so hevur serliga mín góða vermóðir, tey árini vit hava búð í Danmark, men hava verið heima í summarfrí, lagt hús til ólavsøku-føðingardagin. Eisini systir mín í Hoyvík hevur onkuntíð staðið fyri »skotum«. Ivist ikki í, at júst tí føðingardagurin fellur á ólavsøku, hevur hann verið nakað serligt, tí øll eru í veitsluhýri. Ikki minst undirritaði.
Góða Ólavsøku. Eisini tit, sum hava føðingardag hesar frálíku dagar.

# Í taskuna ólavsøku



*Mynd: Sunva Ey. Lassen*

## Hon:

- ❒ Sólbrillur
- ❒ Lummaserviettar
- ❒ Visa-kort
- ❒ Kontantir
- ❒ Alcohol gel
- ❒ Fartelefon
- ❒ Tyggigummi
- ❒ Tannbust
- ❒ Spegl
- ❒ Sminku
- ❒ P-mate
- ❒ Hárklemmur
- ❒ Sikkurheitsnál
- ❒ Fartelefon

- ❒ Knív
- ❒ Plástur
- ❒ Tannsteytarar
- ❒ Feittstift
- ❒ Munnspray
- ❒ Tendrara
- ❒ Hítir
- ❒ Lyklar
- ❒ Fartelefon

## Hann:




*Mynd: Sunva Ey. Lassen*